


LØGTINGSVALIÐ 19. JANUAR 2008

# Tryggja vælferðarsamfelagið



Val X

MARJUS DAM
Sambandsflokkurin

Sambandsflokkurin tryggjar vælferðina-við Ríkisfelagsskapinum.

Vælferðarsamfelagið kostar. Meiri og betri vælferð kostar meira. Hví, kann ein spyrja. Jú tí hækkaðar pensiónir, betri heilsuverk, betri skúlaverk heilt naturliga kostar meira enn eitt verri.

Fleiri loysingarflokkar lova meira vælferð, men samstundis vilja teir loysa og skerja inntøkurnar. Tá hongur ikki saman. Loysing er tí ein hóttan ímóti vælferðarsamfelagnum.

Í Sambandsflokkinum hava vit eitt øðrvísi mál. Vit vilja fyrst og fremst tryggja vælferðarsamfelagið.

Skúlin skal betrast frá fyrsta flokki og uppeftir.

Læraralønir mugu hækkast, so tær eru eins í øllum ríkinum. Undirvísingartilfar, amboð , nútíðargerð av skúlum, betri eftirútbúgvingarmøguleikar o.s.fr. kosta meira pening

Innan heilsuverkið mugu sjúklingar fáa eina nøktandi viðgerð skjótt, av vælútbúnum fólkum, ið ikki eru undirlønt (sama løn í ríkinum).

Skipanir til børn við serligum tørvi, skulu gerast nógv betri sum skjótast.

Alt hetta kostar pening. Hendan pening vilja vit nýta til at bøta um vælferðina. Eftir kreppuna eru nógv viðurskifti, ið als ikki eru fingin í rættlag enn. Hesi viðurskifti skulu uppá pláss. Um nógv avlop tá er, kunnu vit leggja tað til viks, so vælferðartænasturnar kunnu gjaldast, tá niðurgongd aftur verður í fiskivinnuni. Tí niðurgongd kemur. Tað vita vit alt um. Men júst í ringum tíðum skal vælferðarsamfelagið eisini gjaldast. Tað tykjast loysingarflokkarnir at hava gloymt.

X fyriMarjus Dam, Sambandsflokkurin

# Kom nú Havnin!



Val X

BJARTI MOHR
Fólkaflokkurin – listi A

Veljarakanningin gevur Havnini minnstu umboðan á Føroya Løgtingið nakrantíð.

Fíggjarmálaráharrin úr Sambandsflokkinum ætlar at taka kommunukassan frá okkum - tá verður ikki nógv vælferð eftir í Havn, so mikið veit eg.

Góðu borgarar – hetta gongur ikki!

Fólkaflokkurin er tann besti til at byggja henda góða stað, sum er Føroya lands miðstøða.

Vel Fólkaflokkin og fáið sterk umboð fyri Havnina inn á Føroya Løgting.

# Tað ið eg ikki fekk høvið at siga í Kí-høllini



Val X

EYÐGUNN SAMUELSEN
Javnaðarflokkurin

Haldi tað var keðiligt, at ongin áhugi var fyri at tosa um etisk virðir á fundinum. Tí kemur mítt upplegg, og tað ið eg ætlaði at leggja aftrat, tá ið eg fór at fáa orðið aftur.

Javnaðarflokkurin er ein sosialdemokratiskur flokkur ið byggir trý virðir:

**frælsi**
**javnstøðu**
**og samhaldfesti.**

**Frælsi** er møguleikin at skapa sær eitt gott lív út frá egnum fortreytum og evnum. Men frælsið er bert veruligt, um tað er fyri øll.

Tí vilja vit til eina og hvørja tíð raðfesta vælferðina hjá fólkinum fremst.

Tí raðfesta vit í okkara valskrá, at útbyggja vælferðina og at betra dygdina í vælferðini.

Ítøkiliga merkir hetta, at Vit vilja veita viðgerðartrygd innan heilsuverki, soleiðis at skilja, at tað ongantíð ganga meir enn 6 vikur eftir at tú, ella eg, hava fingið staðfest sjúku, innan viðgerð er byrja.

Vit vilja nýta pening til at menna heilsustarvsfólkini, so tey kenna seg fakliga ajour og at tænastan, ið vit fáa innan heilsuverkið, altíð er dagførd og tann besta ið vit kunnu fáa.

**Javnstøða**
Tað góða samfelagi krevur eitt vælvirkandi fólkaræði á norðurlendskum støði, har alt menniskjaliga tilfongi í samfelagnum verður gagnýtt.

Tí vilja vit føra ein miðvísan javnstøðupolitikk, ið skal fáa kvinnuumboðanina í øllum samfelagnum lyft upp á norðurlendskt støði. Ásannandi at tað eru fyrimyndir á hægsta stigi ið verðuliga flyta mørk innan javnstøðu vilja vit binda okkum til at skipa landstýri sambært ásetingunum í javnstøðulógini.

Men javnstøða er ikki bert javnstøða millum kyn, men er fyri øll ,soleiðis at øll hava somu møguleikar og skyldur, óansæð sosialan og etniskan uppruna, kyn, átrúnað ella aðra lívssannføring.

Vit vilja taka hond um familjuna og stremba eftir javnvág millum arbeiðslív og familjulív, so okkara børn fáa tryggar karmar at liva undir.

Hetta vilja vit millum annað gera við at longja barnsburðarfarloyvi, eisini til pápan.

At stakir uppihaldarar gerast javnsetter borgarar í okkara landið. Ítøkiliga vilja vit veita stakum uppihaldarum barnaískoyti og dupultan lestrarsttuðul. Og ikki minst betri møguleikar at seta búgv.

At tímalønt foreldur fáa rætt til lønarendurgjald við barnsins fyrsta sjúkadag.

**Samhaldsfesti**
Í nútíðar vælferðarsamfelagnum merkir samhaldsfesti, at meirilutin skal vera við til at tryggja øllum somu atgongd til øktu vælferðina.

Øll tey, sum eru væl fyri í samfelagnum, eiga at sýna samhaldsfesti fyri teimum ymisku veikaru bólkunum.

Tí skulu fleiri hendir í eldrarøktina og tørvurin á røktarbúplássum verða nøktaður í 2010.

Tí skulu rættindi og virkismøguleikar hjá førleikatarnaðum tryggjast.

Samhaldsfesti snýr seg eisini um at hugsa um komandi ættarlið og at vit sum tjóð vísa altjóða samhaldsfesti.

Tí hava vit økt okkara menningarhjálp í hesum samgonguskeiðnum og vilja vit halda fram við hesum, til vit eru á sama støði við menningarhjálpini sum londini kring okkum.

Tí skulu vit eisini vísa altjóða samhaldsfesti í umhvørvismálum.

Javnaðarflokkurin ynskir at virka fyri einum samfelag,

**har øll hava javnbjóðis møguleikar**

**har øll hava rætt at vera til, at liva og virka og vera øðrvísi.**

**Tí frælsið er bert veruligt, um tað er fyri øll.**

# Javnaðarflokkurin tekur sjálvandi undir við Eftirskúlanum



Val X

JÓANNES EIDESGAARD
Javnaðarflokkurin

Tá lógin um Eftirskúlar fór niðan í tingið, var undirtøkan í landsstýrinum ikki einmælt, tí Sambandsflokkurin og landsstýrismaðurin í fíggjarmálum tók ikki undir við uppskotinum. Men hóast hetta, so metti restin av landsstýrinum málið so týdningmikið, at uppskotið kortini fór niðan. At uppskotið so datt burtur, tá Sambandsflokkurin sá ein politiskan vinning í óðum verkum at leypa frá øllum, er ein onnur søga.

Tí undrar tað meg stórliga, at Johan Dahl førir ósannindir fram í bløðunum um Javnaðarflokkin, har hann sigur, at Sambandsflokkurin hevur drigið okkum til trogið, sum hann málber seg. Eg veit, at Johan persónliga hevur tikið undir við uppskotinum, men tað er so ikki støðan hjá akkersmanninum í Fíggjarmálaráðnum.

Fyri at undirstika okkara støðu, so lat meg vísa til teldupostin, eg sendi Ólavi Rasmussen í hesi vikuni.

**“Ólavur Rasmussen, nevndarformaður**

Gott nýggjár.

Tíverri kom eg ikki fram á bræv títt dagfest 19. des. 2007 aftur fyrr enn í kvøld, nú so nógv annað hevur verið at tikið sær av. Eg síggi, at tit hava sett freistina at svara til mánadagin 7. jan. 2008, og nú skriva vit 8. januar, men vónandi fer tað ikki at bila.

Nú valið er útskrivað, hava vit eina serliga støðu, hvat politiskum støðutakanum viðvíkur. Vit vita ikki, hvør manningin verður eftir valið, so okkara útmeldingar mugu sjálvandi takast við tí fyrivarninum. Tá tað er sagt, so hevur Javnaðarflokkurin verið sera jaligur í eftirskúlamálinum, og vit vóru við til at fáa eitt uppskot niðan í løgtingið, tíverri datt burtur, tá valið varð útskrivað. Eg kann sjálvandi heldur ikki siga, um vit koma í eina samgongusamráðing, men fellur tað í okkara lut, so er tað neyvan nakar ivi um, at hetta málið verður tikið við.”

NB. Tað hevði verið stuttligt at sæð, hvat tit hava svarið hesum spurningi.

# Sjálvbjargni eftir 8 árum



Val X

FRÍÐFINNUR JOHNSSON
Tjóðveldi

**Tjóðveldi er einki at vera bangin fyri**
**Tjóðveldi er ein møguleiki.**

Seta vit okkum sum mál, at vit vilja klára okkum, so kunnu vit eftir einum 7 til 8 árum klára okkum, blokkurin er burtur, og samstundis kunnu vit økja fíggjarlógina við um 100 milliónir um árið.

Hetta vísir ein útrokning, sum ein búskaparfrøðingur hevur gjørt. Treytin fyri hesum er ein fíggjarvøkstur á 5 % hesi árini. Fíggjarvøksturin seinastu árini hevur verið 6 %. So hetta er als ikki órealistiskt

Ein tjóð, sum livir av at fáa pening frá aðrari tjóð, er ikki fræls. Hon verður mangan noydd at gera, sum gevarin sigur. Hetta fingu vit at kenna undir kreppuni. Tá fingu vit eina viðferð, sum neit okkum at hjarta, tað var líka mikið hvønn politiskan flokk, vit hoyrdu til, vit føldu okkum eyðmýkt.

Orðið sigur, at sælari er at geva enn at fáa. Tjóðveldið arbeiðir fyri, at vit sum tjóð vera so væl fyri fíggjarliga, at vit kunnu geva heldur enn at fáa.

Lesið annars www.tjodveldi.fo/fridfinnur